tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Mugu broyta kós

## *Oddagrein*

Eftir samráðingarnar týsdagin tykist greitt, at landsstýrið má sleppa ætlanini at skipa Føroyar sukm fullveldi í ár ella næsta ár. Tá stjórnin - og eitt samt fólkating - heldur fast um, at skiftistíðin bara verður 4-5 ár, er eingin annar møguleiki enn at ýta av á nýggjum.

Landsstýrið fer ikki at leggja eitt samráðingarúrslit, sum var so soltið, út til eina fólkaatkvøðu. Tað kom týðuliga til sjóndar, tá løgmaður, Anfinn Kallsberg, og Helena Dam á Neystabø, fingu henda spurningin. Løgmaður nevndi møguleikan at útsesta dagin fyri, nær fullveldi so skal koma í gildi.

Henda áskoðanin hjá umboðunum fyri Fólkaflokin og Sjálvstýrisflokkin kann ikki tulkast øðrvísi enn, at tey eru ikki so viss í síni fullveldissøk »her og nú«. Tað hevur annars verið aðalmálið hjá samgonguni - at boða frá fullveldinum. Um tað so eisini merkir, at tann realistiski vongurin í hesum flokkum fær tala leiðslunar til rætiis, er ein annar spurningur.

Í tí sambandi er vert at minnast á, at Sjálvstýrisflokkuri hevur landsfund um vikuskiftið og á áskoðanina hjá Hilmari Kass fyri stuttum. Fyrrverandi leiðari Sjálvstýrisfloksins segði við Sosialin, at tilgongdin gekk alt ov skjótt. Hann helti meiri til kósina hjá Javnaðarflokkinum, sum ein stórur partur av sjálvsstýrisveljarunum letur til at taka undir við. Somu skrift hevur løgmaður helst eisini sæð og hoyrt, tí fólkafloksfólk eru alt annað enn fegin við víðgongdu fullveldisætlanina hjá landsstýrinum.

Tá hetta er sagt, skal kortini leggjast afturat, at talan er enn bara um fyrsta veruliga samráðingarfundin, og at langt er enn á mál. Hesuferð eydnaðist at fáa í lag samskifti millum partarnar, og tað kann enda við, at danska stjórnin fer at slaka bæði viðvíkjandi búskaparligari tillagingartíð og ríkisborgararættinum.

Hinvegin skal einaferð afturat sláast fast, at ein meiriluti - ella tann størsti minnilutin - vil heldur hava víðgongt sjálvsstýri í staðin fyri fullveldi. Spurningurin er tí, um politisku flokkarnir ikki skulu venda sær tann vegin og fáa eina breiða undirtøku fyri einum slíkum møguleika. Hvørki Tjóðveldisflokkurin ella loysingarparturin í Fólkaflokkinum hava nakað at missa, um vit velja eina stig fyri stig skipan, sum bæði Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin helst kunnu taka undir við.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Hesa ferð við floyalshandskum og mjúkari rødd

*- men úrslitið var hitt sama*



Haldi tað var láturligt at síggja og hoyra landsins hægstu fólk so fegin og vælnøgd aftaná samráðingarnar týskvøldið 2. mai. Tí skal man taka samanum hetta annað samráðingarumfarið, ber illa til at síggja at landsstýrið hevði nakað annað positivt úrslit av samráðingunum at frøðast um, enn bara hetta, at landsstýrið í heila tikið slapp at tosa við donsku stjórnina um sítt uppskot til nýggja sáttmála landanna millum. Tí virkar nøgdin og frøðin hjá løgmanni, og serliga vara-, sum frøðin hjá børnum um at verða sloppin við í føðingardag. Nyrup tyktist eisini hesaferð so blíðmæltur og vælupplagdur sum sannur veitsluvertur, men í veruleikanum fingu okkara fólk somu boðini hesu ferð sum tey fingu fyrstu ferð. Tann størsti munurin er, at tá tók Nyrup tey við jarnhandskanum — hesa ferð var tað við floyalshandskum og mjúkari rødd.

Tað er ein stórur fyrimunur í tí, tí tá eydnaðist landsstýrinum at venda allan áhugan frá tí ússaliga úrslitinum til eina øsing um ófantaligu framferðina hjá Nyrup. Hesaferð ber tað ikki til: Nú stendur tað veruliga úrslitið, tey eru komnir aftur við, nakið og opið

Tá spurningur er, hvat landsstýrið veruliga fekk heim við sær úr samráðingunum, er svarið ógviliga stutt og einfalt: onki sum kann bjarga fullveldisætlanini!

Teir seinastu dagarnar upp undir samráðingarnar gjørdi landsstýrið tað til eitt altavgerandi og ultimativt krav: at danska stjórnin játtaði vilja sín til at gera ein sáttmála um frælsan felagsskap landanna millum á tann hátt, sum landsstýrið skjýtur upp í sínum uppskoti til sáttmála millum "de høje kontraherede parter", Fullveldið Føroyar og Kongsríki Danmarkar.

Hetta lyftið fingu tey ikki. Danska stjórnin endurtók hinvegin tað, sum hon frammanundan hevur sagt nógvar ferðir uppísaman, at vilja føroyingar hava loysing, skulu teir sjálvandi fáa tað, og sjálvandi verður í tí sambandi neyðugt at gera okkurt slag av avtalu um samstarv landanna millum. Men stjórnin endurtók eisini, at vilja føroyingar hava fullveldi, skulu teir longu eftir 4 árum gjalda tann fulla kostnaðin fyri tað, samstundis sum øll statsborgararættindi hjá føroyingum í ríkisfelagsskapinum detta burtur við tað sama!

Aftur fyri hetta er tað lítil uggi at fáa at vita, at danska stjórnin er til reiðar at virka fyri at føroyingar fáa somu rættindir til útbúgving í norðanlondum, sum íslendingar hava! Hetta snýr seg jú bara um sjálva atgongdina til universitetini. Tað merkir snøgt sagt, at allir fyrimunirnir hjá føroyskum skúlaungdómi — og tað eru nógv onnur enn bara tey lesandi við hægru læristovnarnar, og tað snýr seg um nógv meir enn bara lestrarstuðulin - detta burtur.

Tað størsta — og nógv álvarsamasta — vónbrotið er tó, at búskaparliga skiftistíðin verður bara 4 ár, ikki bara til sjálvan blokkin, men til allar tær 1,3 mia, sum donsku ríkisútreiðslurnar til Føroyar eru. Og komandi fíggjarlógin verður tann síðsta við óskerdari danskari ríkisveiting. Um hálvtannað ár byrjar minkingin í 4 jøvnum kutum, so at frá 1. jan. 2006 verður føroyski búskapurin árliga 1,3 mia. kr. minni enn í dag.

Sjálvt um danska stjórnin hevði slakað í hesum — og tað er onki sum bendir á tað — og skiftistíðin bleiv tað dupulta ella trýdupulta, hevði føroyski búskapurin ikki tolað slíka drening, og føroyska vælferðarsamfelagið hevði rætt og slætt kollsiglt.

Varaløgmaður setir nú sítt álit á, at táið hann á 3. samráðingarumfarinum t. 15. juni fer at krevja stjórnina eftir eini grundgeving fyri, hví hon bara vil ganga við til 4 ár, so kemur Nyrup í neyð og veit ikkim hvat hann skal svara.

Men kanska nýtist varaløgmaður ikki at fara so langt fyri at leita eftir svarinum. Tí hvør hevur elt og bakað hetta karga breyðið, sum Nyrup nú tekur úr ovninum og borðreiðir fyri samráðingarfólkum okkara? Tað hevur ongin annar enn landsstýrisfólkini sjálvir og samgongutinglimirnir annars, so sum tey hava skrólað um hvussu ófatiliga sterkur føroyski búskapurin er. Tey hava spart og lagt til síðis til fullveldið, og nýtt eitthvørt høvi at reypað av teim veldugu árligu avlopunum á føroysku fíggjarlógini. Tey hava gjørt búskaparligar framrokningar, har tey veldugu avlopini bara halda fram og búskaparvøksturin verður tann fimmdupulti av tí sum framkomin lond vanliga rokna við. Tey hava sagt ferð eftir ferð, at vit longu nú klára okkum uttan ríkisveitingina, tí blokkurin fer allur inn á bók. Og hvussu hava tey ikki júkað um, at stuðulin úr Danmark bara er til fortreð og er størsti skaðagripur í føroyska búskapinum!

Nei, løgmaður og varahava onki at fegnast um. Tvørturímóti. Halda teir seg hava verið í Keypmannahavn og vunnið ein sigur, so mugu vit siga: guð náði okkum um teir vinna fleiri av hasum slagnum.

**Hans Pauli Strøm,**
**javnaðartingmaður**

# Sjálvstýri, loysing

Stutt fyri jól stóð eitt svar ella ein viðmerking til endurgáva í Oyggjatíðindum fyrst í desember av fyrstu av 6 smávegis styttum smávegis broyttum greinum, sum fyrr hava staðið í Dagblaðnum frá februar/mars 1995 og framhaldandi, 28 íalt, í Oyggjatíðindum til fyri treimum árum síðani.

Trúgvi F. Guttesen sigur, at eg eri ørkymlaður um ríkisfelagsskapsmálið sum hann væl skilir, leggur hann aftrat, og at eg vil hava sambandskar, dansk sinnaðar føroyingar at fylta niður aftaná eitt fullveldi. Hetta seinasta ivist eg í er vent til mín persónliga. Eg helt, at ongin grund var til at ivast í, at eg eri á loysingarsíðu. Eg haldi meg ikki hava sagt nakrastaðni í greinunum, at sambandskir føroyingar skulu flyta niður aftaná fullveldi, heldur ikki lagt upp til tað. Her skal eg leggja aftrat, at sjálvandi hava føroyingar, sum hava føroyskan bústaðarrætt, somu rættindi.

Trúgvi F. Guttesen nevnir so eitt uppskot um samríki við Danmark í sama viðfangi, sum tosið um ørkymlanina um ríkisrættarligu viðurskiftini, so hann kemur næstan at siga, at eg skuldi kunnað tikið undir við tí. Tað geri eg ikki. Í uppskotinum, Sambandsflokkurin arbeiðir við nú, um Samríki, er onki nýtt hent frá støðuni frammanundan eins og í ríkisfelagsskapsuppskotinum hjá J. Eidesgaard fyri Javnaðarflokkin undir navninum Sjálvstýri. Hvørki brýtur við ríkisfelagsskapin, sum hann higartil er kendur. Hetta er eisini trupult, tí gera tey tað, skal sambandsflokkurin næstan til at niðurleggja seg sjálvan. Javnaðarflokkurin skal til at taka frástøðu frá fyrru søgu síni, tí undir krígnum, serliga í 1946.

Eisini sigur Trúgvi F. Guttesen, skilt við hetta, at eg skal hava skrivað í greinunum, at summir føroyingar síggja niður á aðrar orsakað av politiskari støðutakan á hvør sínari síðu í loysingarmálinum. Tað ljóðar sum um tað er sagt í tí smáa í dagligdegnum, sum eg ikki minnist meg hava sagt og kann láturliggera trupulleikan. Eg nevni hetta í samband við starvseting í tí almenna og alment líknandi størvum, hjar so nógv er goldið úr Danmark, so støðan til tað landið illa er uttanumkomandi at hava týdning. Tað er ikki so nógv at síggja niður á sum at vit ikki eru javnbjóðissettir har. Skúlin er í flestu førum í Keypmannahavn ella Áarósa og øðrum býum niðri. Samskiftið har endar fyrr ella seinni hjá dønum, tá lagað skal verða fyri starvi.

Hetta er viðmerking til mesta ella alt av tí, ið stóð í stutta stubbanum í Dimmalætting stutt inn í desember síðsta ár, endurtikið á síðu 2 í Sosialinum fáar dagar seinni.

**Mannbjørn J. Jacobsen**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**



# Bert skiftistíðin eftir

*Landsstýrið og danska stjórnin eru vorðin samd á fleiri økjum eftir annað umfar av samráðingunum um ríkisrættarligu støðu Føroya. Tó eru partarnir enn ósamdir um skiftistíðina*



*Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri og Anfinn Kallsberg, løgmaður á tíðndafundi á Christiansborg týskvøldið*
**Mynd: FØROYSKA TÍÐINDASTOVAN**

JOHN JOHANNESSEN
ÚR KEYPMANNAHAVN

Danska stjórnin og landsstýrið eru vorðin samd á sjey ymsum økjum eftir annan samráðingarfundin um ríkisrættarligu støðu Føroya. Men partarnir eru ikki vorðnir samdir um skiftistíðina.

Hetta var úrslitið eftir átta tíma langa samráðingarfundin í danska forsætisráðnum týsdagin 2. mei.

Landsstýrið staðfestir, at partarnir eru vorðnir samdir um:

– At danska stjórnin er til reiðar at gera eina avtalu um, at Føroyar fáa fult sjálvræði í einum felagsskapi við Danmark, um føroyska fólkið ymskir hetta.

– At samráðingaruppleggið, landsstýrið legið fyri donsku stjórnina á fyrsta fundinum 17. mars, verður grundarlag undir framhaldandi samráðingunum.

– At danska stjórnin er til reiðar at samstarva um gjaldoyraviðurskifti í nýggja felagsskapinum.

– At danska stjórnin er til reiðar at samstarva um at umsita ymsik málsøki í felagsskapinum.

– At danska stjórnin er til reiðar at gera eina skipan, ið letur føroyingar búsitandi í Danmark varðveita somu rættindi, sum teir í løtuni hava. Harafturat eru partarnir eisini vorðnir samdir um at samráðast um serligar avtalur um rættindi hjá til dømis føroyskum sjómonnum í danska handilsflotanum.

Partarnir gjørdust eisini samdir um, at danska stjórnin skal virka fyri, at føroyingar skulu fáa somu rættindi til útbúgvingar í Norðurlondum, sum íslendingar. Tað vil siga, at virkast skal fyri, at føroyingar kunnu útbúgva seg ókeypis í øllum Norðurlondum.

Seinasta punktið, partarnir gjørdust samdir um, var, at endamálið við framhaldandi samráðingunum skal vera at skapa konkreta innihaldið av einum nýggjum fólkarættarligum felagsskapi millum londini bæði.

### Halda fast um skiftistíðina

Hóast danski forsætisráðharrin nikkaði játtandi, tá løgmaður á tíðindafundunum í speglsalinum eftir samráðingarfundin reksaði upp hesi sjey punktini, var andin ikki júst tann sami, tá komið varð inn á búskaparligu skiftistíðina.

Landsstýrið og danska stjórnin eru nevniliga enn rúkandi ósamd um innihaldið av skiftistíðini. Kravið frá landsstýrinum er ein búskaparlig skiftistíð á 15 ár, har blokkstuðulin fellur javnt øll árini. Tilboðið frá donsku stjórnini er ein skiftistíð á 5 ár, har blokkstuðulin fellur javnt við 20 prosentum av 1,3 milliard um árið til einki er eftir. Ætlanin hjá donsku stjórnini er, at skiftistíðin skal byrja í 2002 og enda í 2006.

Hetta tilboðið vil landsstýrið ikki hoyra um. Bæði løgmaður og Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, eru samdir um, at hetta er ein skiftistíð, føroyska fólkið ikki fer at góðtaka á einari fólkaatkvøðu.

Men bæði løgmaður og Høgni Hoydal rokna við, at tað fer at bera til at samráða seg til eina betri skiftistíð, enn hana, danska stjórnin skjýtur upp. Hetta ætla teir sær at klára á næsta samráðingarfundinum, sum verður í Keypmannahavn 15. juni.

### Fleiri trumfir

Landsstýrið hevur fleiri trumfir at leggja á samráðingarborðið í forsætismálaráðnum 15. juni, ið kunnu gera, at danska stjórnin fer at góðtaka eina aðra skiftiskipan enn hana á 5 ár.

Ein av trufunum er, at møguligar føroyskar oljuinntøkur skulu vigast upp ímóti blokkstuðulinum í eini skiftistíð á 15 ár.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, sigur seg hava eina kenslu av, at danska stjórnin ikki er blind fyri hesum møguleika.

Ein annar møguleiki, sum landsstýrið tó ikki í fyrsta umfari ætlar sær at seta fram sum krav móti donsku stjórnini, er at øll uttanlandsskuldin í ríkinum verður løgd saman og síðani býtt millum partarnar eftir fólkatali. Fyri føroyingar merkir hetta, at meginparturin av føroysku uttanlandsskuldini á meira enn 6 milliardir verður avskirvaður. Danmark hevur nevniliga ikki nakra serliga uttanlandsskuld, og tá okkara 6 milliónir verða býttar eftir fólkatali millum Føroyar og Danmark, er lítið eftir hjá føroyingum at gjalda.

Høgni Hoydal vísir tó í hesum sambandi á, at hann ikki heldur tað vera rætt av føroyingum at renna undan skuldini. Men hann leggur afturat, at hetta í veruleikanum er ein møguleiki, ið danski fíggjarmálaráðharrin, Mogens Lykketoft, vísti á undir samráðingunum týsdagin.

Mogens Lykketoft vísti nevniliga á, at tá føroyingar sambært sáttmálauppskotinum ynskja at taka yvir rískisognir í Føroyum, mugu teir eisini vera sinnaðir at taka yvir rískisskuld.

Ein triðji møguleiki, landsstýrið sær fyri skiftistíð, er at seta nýggja ríkissáttmálan í gildi í stigum, soleiðis, at fullveldismálið ikki er endaliga avgreitt fyrr enn um eini 15 ár.

Hvussu Føroyar kunnu fáa eina trygga skiftisskipan, fer landsstýrið at ráðføra seg við uttanlandsnevdina um.

# Tokið er farið

*Høgni Hoydal fegnast um, at fullveldistokið veruliga fór í gongd undir samráðingunum týsdagin. Men hann ásannar, at vognurin við skiftistíðini koyrir á einum síðuspori*

JOHN JOHANNESSEN
ÚR KEYPMANNAHAVN

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, er fegin um, at samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna nú eru vorðnar realitetssamráðingar og ikki revolvarapolitikkur, eins og samráðingarnar 17. mars.

Landsstýrismaðurin sigur, at nú er tokið umsíðir farið í gongd. Danska stjórnin var opin fyri at viðgera málini, landsstýrið hevði kraft at fáa á dagsskránna, og útmeldingarnar vóru í øllum førum positivar, uttan tá talan var um skiftistíðina. Tí metir Høgni Hoydal bert eitt høvuðsmál enn vera eftir at fáa greiðu á, áðrenn sigast kann, at eitt endaligt samráðingarúrslit so smátt er við at koma undir land.

### Væntaði verri úrlist

Høgni Hoydal sigur, at hann í veruleikanum ikki hevði væntað, at samráðingarfundurin týsdagin fór at gangast so mikið væl. Hann væntaði áðrenn samráðingarfundin, at danska stjórnin enn einaferð fór at vísa føroyska samráðingarútspælinum aftur og koma við einum alternativum uppskoti, eins og hon gjørdi á fyrsta samráðingarfundinum 17. mars.

– Eg má siga, at eg eri glaður fyri, at danska stjórnin ikki var so avvísandi hesaferð, sigur Høgni Hoydal. Hann greiðir frá, at stjórnin reisti nógvar trupulleikar í sambandi við ymsik viðurskifti undir hesum samráðingunum. Men tá føroyingarnir komu við sínum grundgevingum, var eingin trupulleiki.

Høgni Hoydal sigur, at tá kjakast varð um rættindini hjá føroyingum í Danmark í einum nýggjum ríkisrættarligum sáttmála, løgdu danir hart út. Men tá føroyingar komu við sínum grundgevingum og vístu á, at talan er um rættindi hjá dønum í Føroyum, eins væl og hjá føroyingum í Danmark, blotnaði harða linjan hjá stjórnini.

### Skiftistíðin er taktikkur

Høgni Hoydal sigur seg rokna við, at danski forsætisráðharrin heldur fast um hørðu linjuna viðvíkjandi skiftistíðini av tveimum ørsøkum. Onnur er, at hann veit, at stutt skiftistíð ger undirtøkuna fyri ætlan landsstýrisins veikari í Føroyum, og hin er, at Poul Nyrup Rasmussen roynir at styrkja seg innanríkispolitiskt í Danmark.



*Høgni Hoydal heldur, at danska stjórnin var eitt sindur kontantari viðvíkjandi skiftistíðini á tíðindafundinum enn hon var undir samráðingunum*
**Mynd: FØROYSKA TÍÐINDASTOVAN**

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum ger vart við, at danska stjórnin hevði ógvuliga torført við at grundgeva ímóti, at geva danir ikki føroyingum eina rímuliga skiftistíð, verða teir noyddir at rinda føroyingum milliardaupphæddir í minst 20 ár afturat.

Eisini sigur Høgni Hoydal, at danska stjórnin gav nógv positivari útmeldingar um skiftistíðina á samráðingarfundinum enn á tíðindafundinum.